


*Nr. 9* *4. mai 2014* *74. árg.*

# Lívsins orð

*"Farið og stígið fram og talið í halgidóminum øll hesi lívsins orð til fólkið!"*
Áps. 5,20.

Lívsins orð – styttri kann tað ikki sigast, hvat ið kristindómur er. Lívsins orð boða vit, sigur Jóhannes (1.Jóh.1,1) og Paulus talar um at halda lívsins orði fram (Fil.2,16).

Kristus kom, fyri at vit skuldu hava lív. Við boðan síni og lívi avlegði hann ein vitnisburð um, at mannahjartað ikki kann kenna seg nøgt, fyrr enn lívsins orð er komið inn í tað. Vit kunna ikki vera nøgd við bara at vera til. Til eru virðir, sum eru óumverulig hjá tí, sum hevur uppdagað, hvat tað vil siga at vera eitt veruligt menniskja. Hóast tilveran er tryggjað í allar endar og kantar, so krevur hjartað at sleppa í samband við eitt, sum sterkari er enn tað, ið dimmir fyri og hóttir tilveru okkara. Hjartað er óróligt, og satt talaði tann lærdi professarin, tá ið hann segði: "Eg vil trúgva á Kristus, tí mær tørvar fram um alt at verða reinsaður!"

Lívsins orð kann aldri doyggja. Høvdu tey kunnað doyð, vóru tey ikki lívsins orð. Í hesum døgum frøast vit um aftur at síggja lívsins undur gera vart við seg í náttúruni, men um nakrar mánaðir syngja vit aftur: "Nú firnast sól á síni ferð, hon fjalir andlit blítt, og vetrarbúna foldin ber, ið fyrr stóð summarskrýdd." Tilveran er stýrd av tíðarringrásini, og í tí ringrásini er ongin veruligur uggi. Ringrásin má brótast, um vit skulu fáa troyst. Júst tað hendi, tá ið Kristus kom. Páskamorgun boðar okkum, at ringrásin er brotin, og at tað er satt, at Jesus hevur orð hins æviga lívs.

Hví vilja menniskju ikki lurta eftir lívsins orði. Hví leita tey ikki hagar, sum lívsins orð verður boðað? Hví eru tað 117 onnur ting, sum vit eru meira upptikin av enn lívsins orði? Tað er ein gáta. Er

tað tí, at bara tey, sum avlevera sítt egna til deyðan, kunna gerast gripin av lívsins orði? Er tað, tí at náðinnar orð bara hava virði hjá teimum, sum taka við dóminum? – Soleiðis er tað. Hveitikornið má fella í jørðina og doyggja, áðrenn lívið kann sigra. – Men hvussu fer at gangast, um tú ikki fært fatur á lívsins orði?

*Um eg átti alt, men ikki Jesus,*
*var tað so nóg nógv at líta á?*
*Kundi hjartalongsulin tá stillast*
*við teim lutum, sum skjótt enda fá?*
*Um eg átti alt, men ikki Jesus,*
*tá var deyðin lívsins síðsta mál!*
*Hvat er heimsins gleði mót at eiga*
*frið við Gud og frið í síni sál?*

# At eldast

*Og um eg verði gamal og gráur, vilt tú ikki fara frá mær Gud, so at eg fyri komandi ætt kann boða av armi tínum.*
*Sálmur 71,18.*

Tá ið arbeiðslívið er lagt aftur um bak, og tú ert komin eitt sindur upp í árini, sært tú, at tankarnir stundum ferðast aðrar leiðir, enn teir plaga. Soleiðis er støðan eisini hjá sálmaskaldinum her omanfyri. Hann biður eina bøn, sum kemur djúpt úr sálardýpinum, um at Gud ikki skal fara frá honum. Men gev tær far um, at hann biður ikki um at sleppa undan sjúkum ella um at verða spardur fyri okkurt. Nei hann sigur ”so at eg fyri komandi ætt kann boða av armi tínum.” Hann ynskir at geva komandi ættum tað, sum hann sjálvur hevur fingið frá Gudi.

Hvussu gamal tú enn ert, og hvussu gamal tú verður, so verður tú sum kristin aldri arbeiðsleysur. Orkar tú ikki at gera so nógv, so kanst tú altíð liva eitt virkið bønarlív, tí vit kunna biðja fyri øllum heiminum og fyri øllum, sum vit hitta. Og okkum tørvar at biðja bønina:”Fyrigev mær syndir mínar, men far aldri frá mær.”

Í Bíbliuni lesa vit um 84 ára gomlu profetkvinnuna Annu Fanuelsdóttir, sum gjørdist tíðliga einkja. Um hana stendur, at hon veik ikki úr halgidóminum og tænaði Gudi við føstu

og bønarhaldi nátt og dag. Hon var eisini stødd har, tá ið tey komu við Jesusi, fyri at hann skuldi verða umskorin. Nú prísaði hon Gudi, tá ið hon sá Jesus. Soleiðis eiga vit eisini at gera. Og tað hava vit góðar orsakir til, tí vit hava ein Gud, ið einaferð var eitt lítið barn, og sum eisini er okkara og heimsins frelsari. Tað kunna vit – saman við Annu – takka og prísa Gudi fyri.

*Ger tað sindrið, tú kanst,*
*minst til, at tað er so:*
*Gud hjá øllum bert trúskap vil sjá.*
*Glaður ver, um tú bert eini neyðarslig boð,*
*tí hann sjálvur við hjálp er tær hjá.*
*O, tann gleði tann dag Jesus man siga tær:*
*tað, tú gjørdi, var gjørt móti mær!*

# Samhaldsfesti

Carl-Gustav Severin

Evangeliið setir menniskju í frælsi, alkohol og onnur rúsevni gera fólk til trælir. Vit fáa øll tilboð um frælsi í Kristusi.

Tað er undursamt at síggja, hvussu Gud kann broyta menniskju, tá ið tey lova honum framat.

Kristin eiga at ganga á odda sum góðar fyrimyndir í fráhaldsmálinum. Eg eri vónbrotin, tí fleiri meinigheitir tykjast at hava eina frælslynta støðu til alkoholnýtslu. Eg haldi, at tað er synd, at kristin drekka. Einki beinleiðis forboð ímóti alkoholnýtslu er í Bíbliuni; men um vit hugsa um, at tað eru 385.000 børn í Svøríki – og eisini nógv í Føroyum – sum hava eitt torført lív, av tí at familjan drekkur, so eiga vit at vísa samhaldsfesti mótvegis teimum. Vit mugu hugsa samanhald við ein minniluta.

Set nú fyri, at ein alkoholikari verður frelstur, umvendur og turrlagdur, tá vilja vit jú fegin, at hann kemur inn í eina meinigheit. Hvat tá, um meinigheitin, ið hann kemur til, hevur eina frælslynta støðu til alkohol, ja, at tað kanska er vani, at tey brúka alkohol í meinigheitini? Tá kann nýumvendi vinur okkara skjótt glíða út aftur. Er hetta ein ábyrgd, sum vit tora at taka á okkum? Eg eggi øllum – og ikki minst samkomuleiðarum – at vera fullkomin fráhaldandi.

Effie Campbell umsetti.

# Lat upp!

"Í dag lati eg ikki upp fyri nøkrum, tó at tey banka hart á dyrnar," segði ein gomul illa hýrd kona í Skotlandi. Hon var ilslig og ónøgd við alt og øll. Um kvøldið bankaði á dyrnar hjá henni. Hon læt ikki upp. So bankaði aftur.

"Banka so leingi, tú hevur hug!" geylaði hon, "eg lati ikki upp!"

So bankaði ikki longur, og hon hoyrdi onkran rýma.

Dagin eftir fekk hon at vita, at tað var Viktoria drotning, ið hevði bankað á dyrnar hjá henni. Drotningin helt frítíð har um leiðir og vildi fegin støkka inn á gólvið hjá gomlum fólki at gleða tey.

Sum tann gamla konan var ørg! Hon hevði alla skyldina, at hesin háborni gesturin mátti rýma og slapp ikki inn at gleða hana.

"Sí, eg standi við dyrnar og banki uppá. Um einhvør hoyrir rødd mína og letur upp dyrnar, tá skal eg fara inn til hansara og eta nátturða saman við honum, og hann við mær!"

Tað er hin himmalski kongssonurin, sum gevur hetta tilboðið. Á, tann høgtíð og gleði, um tú svarar honum soleiðis:

"Tú Guds vælsignaði, kom inn!"

*t.* týddi.

---

Tey gomlu plagdu at prenta hetta orðatakið niður í børn síni:

Forgæves du til kirke går
for der Guds ord at høre,
om glemsom du tilbage går,
vil ej derefter gøre.

*e.c.* ums.

---

**SUNNUDAGSSKÚLIN**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 4. mai. | Tekstur: | 1. Kong. 17,1-16; | bíbliuorð: | Luk.1,37 |
| 11. mai. | Tekstur: | 1. Kong. 18,17-39; | bíbliuorð: | 1.Kong.18,39b |
| 18. mai. | Tekstur: | Dán. 1,18-20 og 3,1-30; | bíbliuorð: | 2. Mós. 20,3 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




***Nr. 10*** ***18. mai 2014*** ***74. árg.***

# So kom Jesus

*Nú vórðu lærusveinarnir glaðir, tá ið teir sóu Harran.*
*Jóh. 20, 20.*

Páskakvøld sótu lærusveinarnir aftan fyri stongdar dyr í Jerusalem. Hendingaríkur hevði dagurin verið, og allir høvdu okkurt at fortelja. Men enn høvdu teir ikki skilt, hvat tað merkti, at Kristus var risin upp. Hvar var hann? Hví var alt broytt. Tordu teir at vóna, at jødarnir ikki fóru at taka sakina uppaftur? Um teir hesa ferð fóru at taka lærusveinarnar? Nei, frígjørdir vóru teir ikki. - So kom Jesus. Brádliga stóð hann mitt ímillum teirra. „Friður veri við tykkum!“ segði hann. Og ta heilsanina kendu teir. Hann vísti teimum naglamerkini og sárið eftir spjótstingin undir síðuni. Lærusveinarnir gjørdust glaðir.

Henda myndin lýsir rættiliga væl støðuna hjá kirkjuni í dag. Vit hava hildið páskir. Vit hava verið við Jesu kross og hoyrt, hvat hendi páskamorgun. Og vit trúgva, soleiðis sæð, øllum. Okkum dámar páskirnar, tær eru ein vøkur hátíð, nú alt sprettir og grør. Gott er at hoyra, at lívið er sterkari enn deyðin. – Men hvussu er vorðið við okkum? Hvør situr aftan fyri stongdar dyr av ótta fyri jødunum? Hvussu sæst tað í lívi okkara, at Jesus livir?

Lærusveinarnir gjørdust glaðir, tí teir sóu Harran. Ja, tað skilja vit. Men soleiðis uppliva vit tað jú ikki. – Nei, ikki á sama hátt. Men satt er, at tað einasta, sum kann fylla hjartað við varandi gleði, er at fáa eyga á tann upprisna Kristus. Paulus visti, hvat hann gjørdi, tá ið hann formanaði tann mótlítla Timoteus við orðunum: ”Minst til Jesus Krist risin upp frá deyðum.” 2.Tim. 2,8.

At minnast Jesus sum tann upprisna merkir at líta á, at hann eisini í dag kemur inn til teir mótfalnu og bangnu lærusveinarnar,

sum sita innan fyri læstar dyr – hóast teir hava hildið páskir. Send honum boð! Bið hann koma við friðarheilsanini og gera teg glaðan, ævigt glaðan!

*Eg veit, hvar góð er grundin,*
*eg veit, hvar ljós er lon,*
*tá verøldin fer sundur*
*og fúnar øll í fon.*
*Eg veit, hvat ei kann vikna,*
*hvat aldri vikast vil,*
*tá vísmenn allir bikna,*
*ei vita veg og skil.*

*Tað er tann klettur baldi*
*og tryggi – tað er vist –*
*tann hond, sum mær vil halda,*
*tað er mín Harri Krist.*
*Hann er mín stjørna bjarta,*
*sum vísir mær á leið,*
*hans andi vermir hjartað,*
*og orð hans sloknar ei.*

# Guds skapandi orð

*Onki av øllum teim góðu orðum, ið Harrin hevði givið húsi Ísraels, svitaðist; øll gingu út.*

*Jós. 21,45.*

Guds livandi orð skapar tað, sum tað nevnir. Tað er reyði tráðurin ígjøgnum alla Bíbliuna.

Í fyrstuni skapaði Gud himmalin og jørðina. Við sínum talaða skaparorði gjørdi hann alt, sum hann frammanundan hevði sæð fyri sær, til livandi veruleika. Men tað var ikki bara í fyrstuni, at Gud skapti nýtt lív við sínum talaða orði. Gud hevur gjøgnum allar tíðir skapað, og hann skapar enn. Tað síggja vit hvørja ferð, tá ið várið kemur, og alt sprettur og grør, og nýtt lív verður skapað.

Gud hevur umsorgan fyri sínum skaparverki. Serliga fyri okkum menniskjum, sum hann hevur skapað í síni egnu mynd. Í frásagnunum í evangeliunum í Nýggja Testamenti uppliva vit ferð eftir ferð, at Jesus Kristus, sum er sonur hins livandi Guds, hevur Guds skapandi orð. Jesus hótti at aldu og vindi, og tað gjørdist blikalogn. Jesus talaði, og tann deyvstummi fekk hoyrnina og talaði. Jesus talaði, og dóttir Jairusar vaknaði aftur til lívs. Júst evnini at skapa við sínum talaða orði er ein av Guds eginleikum, sum eisini Jesus hevur.

Vit mugu støðugt undrast og takka Gudi, sum hevur skapað alt lív og givið okkum tað. Vit síggja stóra munin á Gudi og menniskjum júst í evnunum at skapa nýtt lív við bert at

tala orðið, ið skapar tað, sum tað nevnir. Bara Gud kann á henda hátt skapa nýtt. Og tað undurfulla er, at hann nýtir sín skapanarmátt at vælsigna okkum, sínar skapningar, meðan vit liva her á jørðini. Og ikki minst við, at hann gevur okkum ævigt lív, tá ið vit doyggja.

*Mær, Harri, unni*
*at tæna eina tær*
*við sál og munni,*
*sum orð títt loyvir mær;*
*um verðin rívur*
*mítt hold sum nota stinn,*
*um sjúka nívir,*
*so gev mær tol í sinn'!*
*Inntil tað lívir,*
*har tú meg leiðir inn.*

*Har skal eg vera*
*hjá tær um alla tíð*
*og krúnu bera*
*sum halgifjøldin blíð;*
*tí vil eg bjóða*
*tær lív mítt alt í verð,*
*so tað man ljóða,*
*tá skilnarstund tað er:*
*„Far heim, hin góði,*
*við mær á himnaferð!"*

# Mikil prædikumaður

"Ein mikil prædikumaður!" segði summargesturin við bóndan, sum hann búði hjá. Teir høvdu báðir verið í kirkju.

"Eg hoyri teg," segði bóndin.

"Íðan, var prædikan ikki góð? Ja, tit bygdamenn hava sjálvandi ikki skil á slíkum. Í hasi prædikuni fekk ein okkurt at vita. Á, tann kunnleiki um søgu Bíbliunnar og náttúruna í heilaga landinum!"

"Kanska," viðgekk bóndin stillisliga," er tað mín skyld, at eg dugdi ikki at virða hasa prædikuna. Men, sært tú, eg væntaði, at hoyra okkurt um vegin til himmalin, og so fekk eg staðin fyri at hoyra um vegin frá Jerusalem til Jeriko.

Handa vegin fari eg kanska ongantíð at ganga, men øll skulu vit einaferð fara hiðani til eitt annað land. Tí gjørdist eg vónbrotin, tí eg hevði glett meg til at hoyra um, hvussu eg skal koma heilskapaður hiðani og heim í himmalin."

*t.* týddi.

---

Eingin sjónleikari, ið stendur á palli, spælir nakað, ið ikki stendur í handritinum, og á sama hátt eru vit noydd at halda okkum til "rolluheftið", Bíbliuna! Uttan mun til, hvat ið øll onnur gera, so mugu vit fylgja Guds handriti fyri lívi okkara.

*e.c.* ums.

# Bønin er lívsnervin

Hvør hevur ein brennandi kærleika til hansara, sum gav lív sítt fyri øll menniskju til allar tíðir.

Harrin kallar medarbeiðarar út á vøllin. Tú hevur nóg leingi fjalt teg aftan fyri onnur. Alla tíðina hevur tú vitað, at tú hevur eitt kall til ta síðstu tíðina. Fá tær samband við aðrar menn og kvinnur, sum hava somu visjón, og farið so út á gøturnar og til verka. Í hesum virka meinigheitirnar heldur sum ein bremsa enn ein, sum hjálpir til at skumpa undir. Tað er næstan ógjørligt at endurnýggja brúktar skinnsekkir.

Men tað skal biðast nógv! Tá er tað gott at minnast til orðini hjá Dávidi, at Harrin hoyrir bønir okkara og tekur ímóti teimum: "Harrin hevur hoyrt mína eymkan, Harrin tekur við míni bøn." Sálm. 6,10. Tað er ein undurfullur andaligur veruleiki, at okkara bønir hava rúm uppi hjá Gudi, at bønir okkara sleppa at stíga upp sum roykilsi fyri altari Harrans. Bønirnar verða samlaðar í gullskálum uppi í Himli: "Gullskálir, fullar av roykilsi, og eru tað bønir teirra heilagu." Opb. 5,8. - "Og annar eingil kom og fór at standa við altarið; hann helt á roykilsiskeri av gulli, og honum varð fingið nógv roykilsi, fyri at hann skuldi leggja tað aftur at bønunum frá øllum hinum heilagu á gullaltarið framman fyri hásætinum. Og roykurin av roykilsinum steig upp við bønunum frá hinum heilagu úr hond eingilsins fyri ásjón Guds." Opb. 8,3-4. Orðini hjá Dávidi seta dagsskránna fyri, hvussu týdningarmikið tað er at halda seg sjálvan og onnur á lívi gjøgnum bøn.

Og bønin gevur úrslit: Á einum møti í Tokyo reisti ein ungur maður seg upp at vitna. "Eitt kvøldið gekk eg ein túr oman gjøgnum nakrar bakgøtur," segði hann. "Eg læt tárini streyma frítt yvir lívsins avbjóðingar. Pápi var vorðin sjúkur, og eg varð tí noyddur at gevast við lestrinum á fróðskaparsetrinum. Tá sá eg eitt samanrukkað pappír á gøtuni. Eg tók tað upp og slættaði tað. Tað var ein traktat, sum nevndist "Hin einfaldi vegurin til frelsu". Eg las hana og fann Jesus."

*Effie Campbell* umsetti.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 18. mai. | Tekstur: | Dán. 1,18-20 og 3,1-30; | bíbliuorð: | 2. Mós. 20,3 |
| 25. mai. | Tekstur: | Dán. 6, 1-25 | bíbliuorð: | Dán. 6,27b |
| 1. juni. | Tekstur: | Jóh.14,1-3 og Mark. 16, 19-20 og Matt. 24, 30-31 | bíbliuorð: | Jóh. 14,2a |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74